# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Jonathan Motzfeldt er og verður landsfaðirin - bæði fyri okkum í Siumut og fyri grønlendska fólkið sum heild*

*(Hans Enoksen)*

# Hann fór við øllum



*Barrack Obama vann øll uppstillingarvalini hjá demokratunum hetta vikuskiftið (Mynd: AP)*

**Hillary Clinton tapti so dyggiliga uppstillingarvalini um vikuskiftið, at hon gav sínum fyriskipara sekkin**

Barrack Obama gjørdi eitt rimmar hál á uppstillingarvalunum hjá demokratunum hetta vikuskiftið. Hann vann øll valini. Seinast í Maine í gjár. Har høvdu tey flestu væntað, at Hillary Clinton fór at vinna, men tá 87 prosent av atkvøðunum vóru taldar tíðliga í morgun, hevði Barrack Obama fingið 59 prosent, og Hillary Clinton hevði fingið 41 prosent.

Maine sendir 24 valmenn á uppstillingarfundin hjá demokratunum, og úrslitið í gjár merkir, at Obama fær 15 av teimum 24 valmonnunum og Hillary Clinton hinar níggju. Sambært einari samanteljing hjá tíðindastovuni AP hevur Barrack Obama nú tryggjað sær stuðul frá 1.106 valmonnum, meðan Hillary Clinton hevur 1.135 í sínum parti. Fyri at fáa meiriluta skal annað valevnið tryggja sær 2.049 valmenn.

Veljararnir í Maine løgdu nógv fyri fyri at sleppa á val. Nógvastaðni í statinum var illfýsið við nógvum vindi og kava, men kortini vóru bíðiraðirnar langar uttan fyri valhølini.

Leygardagin vann Obama sannførandi í Washington State, Nebraska og í Louisiana. Tann mest sannførandi sigurin vann hann kortini á Jomfrúoyggjunum, har 89,9 prosent av teimum 1.772 veljarunum atkvøddu fyri honum.

## Nýggjan fyriskipara

Í gjár vóru bæði Barrack Obama og Hillary Clinton í Virginia, har uppstillingarval verður í morgin. Tá verður eisini val í Maryland og í høvuðsstaðnum Washington D.C., og meiningakanningar vísa, at Obama er klárt á odda allastaðni. CNN vísir á, at felags fyri Virginia, Maryland og høvuðsstaðin er, at har búgva nógv svørt fólk, sum yvirhøvur eru væl útbúgvin, og júst hesi eru kjarnuveljaraskarin hjá Obama.

Í gjárkvøldið kunngjørdi Hillary Clinton, at hon hevði fingið sær annan fyriskipara til valstríðið. Higartil hevur Patti Solis Doyle skipað fyri valstríðnum hjá Hillary Clinton, men eygleiðarar halda, at tað sera vánaliga úrslitið um vikuskiftið fekk Hillary at skifta hana út.

Nýggjur fyriskipari er Maggie Williams, ið eins og Patti Solis Doyle hevur arbeitt saman við Hillary Clinton í mong ár. Solis Doyle heldur kortini fram í bólkinum, sum leggur valstríðið til rættis.

## Kann venda í Texas

Eftir fleiri ósigrar í seinastuni og ivaleyst nakrar afturat í hesum mánaðinum miðjar Hillary Clinton eftir at vinna uppstillingarvalini í teimum báðum stóru statunum Texas og Ohio, sum verða fyrst í næsta mánað.

Í hesum báðum statunum er veljarafjøldin sett soleiðis saman, at tað helst kemur Hillary Clinton til góðar. Í Texas eru nógv fólk av meksikonskum uppruna, ið verða hildin at styðja Hillary Clinton, og í Ohio eru nógvir eldri veljarar og og harafturat nógv arbeiðsleys. Júst tey eldru og arbeiðarastættin eru millum kjarnuveljararnar hjá Hillary Clinton.

# Tann størsta hóttanin ímóti heimsfriðinum

**Tann størsta hóttanin ímóti heimsfriðinum er, at yvirgangsmenn kunnu fáa fatur á kjarnorkuvápnum**

- Tað er sera umráðandi, at lond, sum hava kjarnorkuvápn, tryggja tey so væl, sum tað yvirhøvur ber til, tí tað er eingin ivi um, at kjarnorkuvápn á skrivum hondum eru tann mest álvarssama hóttanin ímóti heimsfriðinum og heimssamfelagnum í dag.

Tað segði stjórin í altjóða kjarnorkustovninum IAEA, Mohammed ElBaradei, í einari røðu, sum hann helt á einari ráðstevnu fyri verjuovastum leygardagin. Hann mælti samstundis øllum kjarnorkuveldunum til at skarva av sínum kjarnorkuvápnagoymslum.

- Lond, sum hava kjarnorkuvápn, aftra seg við at brúka tey, tí tey vita, at tey verða løgd í oyði, sjálvt um tey hava kjarnorkuvápn. Men yvirgangsmenn fara at brúka kjarnorkuvápn, fáa teir fatur á teimum, segði stjórin í IAEA.

Mohammed ElBaradei mælti altjóða samfelagnum til at tingast við Iran fyri at fáa vissu fyri, at landið ikki brúkar sína kjarnorkutøkni til at gera kjarnorkuvápn við.

- Vit fáa ikki álit á hvør øðrum uttan at tosa saman, segði El Baradei, sum fekk Nobel-friðarheiðursløninina saman við IAEA í 2005.



*Mohammed ElBaradei: -Vit fáa ikki álit á hvør øðrum uttan at tosa saman*

**STUTT SAGT**

## Obama verður myrdur

Hevur bretski rithøvundurin Doris Lessing rætt, eigur Barrack Obama kanska at taka seg burtur úr valstríðnum í USA. Doris Lessing, sum hevur fingið Nobel-heiðurslønina í bókmentum, sigur við svenska blaðið Dagens Nyheter, at verður Obama valdur til forseta í USA, fer onkur at beina fyri honum. Tí hevði tað verið betur, um Hillary Clinton vann, sigur Doris Lessing, men best var, um hon og Barrack Obama stillaðu upp saman, soleiðis hann hann bleiv varaforseti hjá henni, sigur Doris Lessing við svenska blaðið.

## bin Laden og Omar í Pakistan

Bæði leiðarin í al-Qaeda, Osama bin Laden, og leiðarin í Taleban, mullah Mohammad Omar, eru í Pakistan. Tað segði ein týðandi amerikanskur embætismaður í gjár. Hann vildi tó ikki leggja navn til tíðindini. Embætismaðurin legði afturat, at teir næstu menninir hjá bin Laden og mullah Omar eru eisini í Pakistan. Amerikanskir talsmenn hava fyrr sagt, at teir ovastu leiðararnir í Taleban fjala seg hjá vinfólki í Baluchistan, sum er fjallalendið á markinum millum Pakistan og Afghanistan.

## Burtur við el-stólinum

Hægstirættur í amerikanska statinum Nebraska hevur bannað fongslunum at avrætta deyðadømdar fangar við elektriska stólinum. Hægstirættur í statinum sigur í einum úrskurði, at tað er í andsøgn við amerikonsku grundlógina at brúka elektriska stólin til at taka fólk av døgum við. Úrskurðurin hjá hægstarætti ger, at teir lokalu myndugleikarnir í Nebraska noyðast at broyta verandi lóg, so hon samsvarar við úrskurðin hjá tí ovasta dómsstólinum í statinum.